Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	24/02/2023
Mál nr.:	21/08705
Málsviðgjørt:	SJ/OYS
Ummælistíð:	03/02/2023- 06/02/2023
Eftirkannað:	07.02.2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at umbyggja og útbyggja eftirskúlan Rásina

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður umbygdur og útbygdur.
Stk. 2. Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 25 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Skúlatilboðið Rásin er eitt heildartilboð til ung við menningartarni, ið eru liðug við fólkaskúlan. Skúlatilboðið skal geva næmingum møguleika at førleikamenna seg til lestrar- og arbeiðslívið, og eftir lokið skúlaskeið eru næmingarnir klárir at fara á møguliga serbreyt og ella í vart arbeiði, og megna somuleiðis at flyta heimanífrá til eitt tillagað bútilboð frá Almannaverkinum, og til at liva eitt so sjálvstøðugt lív sum gjørligt.

Sambært § 3, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai 2015, skal upptøka til skúlan fara fram á hvørjum ári. Fyri at upptøka kann fara fram á hvørjum ári, má pláss vera fyri fleiri næmingum afturat í skúlanum. Karmarnir í skúlatilboðnum skulu tí víðkast, og hetta krevur eina umbygging og útbygging. Ætlanin er, at skúlin skal hava búpláss til 7 næmingar afturat, í alt 14 næmingar.

Rásin heldur til í einum sethúsum í Saltangará, sum fyrr eru umbygd og umvæld til virksemi hjá eftirskúlanum. Sum ein alternativ loysn hevur verið umrøtt at byggja nýggj høli til skúlan við aðrari staðseting. Umboð fyri skúlan hava tó mælt til, at hildið verður fast við verandi staðseting, tí Rásin liggur sentralt í býnum, við stuttari frástøðu til m.a. bussteðgistøð, krambúðir, mentanartilboð og annað, ið hoyrir einum býi til, og verður hetta mett at hava týdning fyri tað endamál, ið Rásin skal virka eftir. Mælt verður tískil til, at hildið verður fast við verandi staðseting.

Í verandi bygningi verða ikki gjørdar størri umvælingar við verkætlanini. Tó skulu trý rúm broytast, eitt kamar skal flytast har, sum ein loftsstova er í dag, til tess at gera pláss fyri einum vaskirúmi, ið verður samanknýtt við nýggja køkin. Bygdur verður ein nýggjur bygningur omanfyri verandi bygning. Hesin er í tveimum hæddum við kamarslon á ovaru hæddini og undirvísingarhølum og felagshølum á niðaru hæddini. Ein millumbygningur verður bygdur, ið knýtir gamla og nýggja bygningin saman. Í hesum millumbygningi verður m.a. nýggjur køkur gjørdur.

Eisini skal nakað av arbeiði gerast við økið uttanum bygningin, eitt nú at fáa til vegar størri parkeringsøki.

Samlaða byggistigið fyri nýggja bygningin er 450 m2, meðan samlaða nýtslustigið er 566 m2, tað er, tá ið kjallarahæddin, ið er innrættað við verkstaði, goymsluhøli, teknikrúmi o.ø., verður tikin við.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er viðvíkjandi umbygging og útbygging av Rásini í Saltangará.

Viðvíkjandi rakstrinum av Rásini verður vísst til løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai 2015.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at nýta upp til 25 mió. kr. til verkætlanina at um- og útbyggja Rásina í Saltangará.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið er ein neyðugur liður til tess at um- og útbyggja eftirskúlan Rásina í Saltangará, soleiðis at pláss verður fyri fleiri næmingum afturat í skúlanum, og at upptøka av næmingum kann fara fram á hvørjum ári. Hetta fyri betur at kunna nøkta eftirspurninginum eftir tílíkum eftirskúlatilboðum.

Tá um- og útbyggingin er liðug, verða karmarnir víðkaðir soleiðis, at tvífalt so nógvir næmingar rúmast í skúlanum, og verður tað síðani pláss fyri 14 næmingum í skúlanum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá eftirskúlanum Rásini, Landsverki og Fíggjarmálaráðnum, og var uppskotið harumframt lagt fram alment við stuttari hoyringarfreist.

Eftirskúlin Rásin viðmerkti, at av tí, at verkætlanin er minkað niður í 450 m2 er talan um trý dupultkømur og eitt einkultkamar, tað er í alt 7 fleiri búpláss, men í 4 kømrum. Barna- og útbúgvingarmálaráðið tók viðmerkingarnar til eftirtektar.

MEGD hevur ymiskar viðmerkingar til uppskotið, m.a. atkomuviðurskifti, um stuttu ummælisfreistina, um avleiðingarnar av uppskotinum í mun til Brekrættindasáttmálan hjá ST, og um luttøku, samskifti og samstarv við áhugafelagsskapir, ið umboða fólk í Føroyum, ið bera brek.

Atkomuviðurskiftunum viðvíkjandi skal Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðmerkja, at tað í verkætlanini er tikin hædd fyri galdandi krøvum, ið sett verða til atkomuviðurskifti, sbrt. kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið er samt við MEGD í, at ummælisfreistin fyri øll lógaruppskot sum meginregla eigur at vera 4 vikur. Í hesum føri elvdu ymisk viðurskifti til, at ikki bar til at halda hesa meginreglu, um so var, at uppskotið skuldi leggjast fyri Løgtingið í hesi tingsetu. Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur tó viðmerkingarnar frá MEGD til eftirtektar, og skal frameftir leggja seg eftir, at verklagslógir verða sendar til ummælis við ummælisfreist á 4 vikur.

Viðvíkjandi rættinum hjá áhugafelagsskapinum at luttaka, samskifta og samstarva við myndugleikar, ið taka avgerðir, ið hava týdning fyri fólk í Føroyum, ið bera brek, skal Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðmerkja, at ítøkiliga lógaruppskotið hevur til endamáls at heimila landsstýrismanninum at játta pening til eina verkætlan, ið longu frammanundan er fyrireikað og bjóðað út, og er tað við støði í kostnaðarmetingini, at uppskotið nú verður lagt fyri Løgtingið. Tað er sostatt avmarkað, hvussu stórar tillagingar kunnu gerast í sjálvari verkætlanini.

Ráðið skal tískil vísa á, at um so er, at MEGD, ella aðrir áhugafelagsskapir, ynskir at gera sína ávirkan galdandi í mun til ítøkiligar byggiverkætlanir, so noyðist áhugafelagsskapurin at seta fram síni sjónarmið, áðrenn verkætlanin hevur tikið skap, tað er t.d., áðrenn prosjekteringin av verkætlanini er komin at enda.

Landsverk og Fíggjarmálaráðið høvdu ikki beinleiðis viðmerkingar til uppskotið, men er uppskotið annars fyrireikað í samstarvi við hesar myndugleikar.

Ongar aðrar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verkætlanin hevur verið bjóðað út, og við støði í innkomnu tilboðunum metir Landsverk, at samlaði byggikostnaðurin verður í alt 25 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Frá 2019 til 2022 eru brúktar 1,7 mió. kr. til at fyrireika og prosjektera verkætlanina, íroknað 350 tús. kr. av samlaðu játtanini fyri 2022 á 4,5 mió. kr. Írestandi 4,15 mió. kr. av játtanini fyri 2022 verða fluttar fram til 2023.

Umframt framflytingina fyri 2022 skulu tað í 2023 játtast 7,8 mió. kr., og gevur hetta tilsamans 11,95 mió. kr. í 2023.

Í 2024 skulu játtast 11,35 mió. kr., men annars verður verkætlanin framd sambært játtanum veittum í fíggjarlógini.

Tá talan er um fleiri fermetrar, fleiri næmingar og upptøku á hvørjum ári, fara rakstrarútreiðslurnar hjá Rásini at økjast munandi, eftir at útbyggingin er framd. Mett verður, at raksturin fer at økjast við umleið 3 mió. kr. árliga.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið ber í sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið ber við sær økt virksemi fyri byggivinnuna í byggitíðarskeiðinum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Bygningurin verður bygdur samsvarandi galdandi regluverki innan bygging, og sum fyriheldur seg til ávísa burðardygd í bygging.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Útbyggingin av eftirskúlanum Rásini fer at hava við sær økt virksemi í nærumhvørvinum, bæði í byggitíðarskeiðinum og ikki minst, tá um- og útbyggingin verður liðug, við tað at fleiri starvsfólk og fleiri næmingar fara at vera knýttir at skúlanum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Við útbyggingini fáa ung við serligum tørvi, ið eru liðug við fólkaskúlan, munandi betri skúlatilboð.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður, at lógaruppskotið hevur positivar avleiðingar í mun til sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi einstaklinga, ið bera brek, serliga viðvíkjandi útbúgving og luttøku í samfelagnum annars.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp til 25 mió. kr. til at um- og útbyggja Rásina í Saltangará. Tað er Landsverk, ið vegna landsstýrismannin fær verkætlanina og játtanina at umsita.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í stk. 1 verður heimild givin landsstýrismanninum at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður um- og útbygdur. Hetta við bakstøði í, at upptøka á Rásini, sbrt. § 3 í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, skal fara fram á hvørjum ári. Til tað krevst, at pláss er fyri fleiri næmingum í skúlanum, og tí eisini, at karmarnir í skúlanum verða víðkaðir.

Ásett er í stk. 2, at samlaði kostnaðurin í mesta lagi kann verða 25 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Til § 2
Ásett verður, at løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Løgtingslógin fer úr gildi 1. januar 2026, tá ið samtykta játtanarskeiðið er av, og umbyggingin og útbyggingin væntandi er liðug.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 24. februar 2023

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar 1 frá eftirskúlanum Rásini
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar 2 frá eftirskúlanum Rásini
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Landsverki
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá MEGD
Fylgiskjal 5: Landsverk - Lýsing av verkætlanini
Fylgiskjal 6: Landsverk - Støðumynd
Fylgiskjal 7: Landsverk – Flatmynd 0. hædd
Fylgiskjal 8: Landsverk – Flatmynd 1. hædd
Fylgiskjal 9: Landsverk – Flatmynd 2. hædd